Fíggjarmálaráðið

Løgtingið

Dagfesting:	08. desember 2020
Mál nr.:	20/00515
Málsviðgjørt:	JEK
Eftirkannað:	18. november 2020

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin)
(Leingja heimildina at fáa meirvirðisgjald endurrindað í sambandi við bygging ella umbygging av ávísum leigubústøðum, keyp av ávikavist orkuvinarligum motorakførum og elriknum hitapumpuskipanum og dagføring av reglunum um leigubilar)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin), sum seinast broytt við § 51 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 3 b, stk. 2, nr. 4 verður "31. desember 2020" broytt til: "31. desember 2025".

2. § 3 c verður orðað soleiðis:

"**§ 3 c.** Tann, sum keypir motorakfar, sum er fevnt av løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum, sum bert nýtir ravmagn ella vetni til framdrátt, kann eftir umsókn fáa part av meirvirðisgjaldinum endurgoldið. 1. pkt. er eisini galdandi fyri sonevnd plug-in hybrid akfør, PHEV.
Stk. 2. Í 2021 og 2022 verða í mesta lagi kr. 70.000 endurgoldnar eftir hesi grein. Í 2023 og 2024 verða í mesta lagi kr. 35.000 endurgoldnar eftir hesi grein. Í 2025 og fylgjandi ár verður meirvirðisgjald ikki endurgoldið.
Stk. 3. Fyri at fáa endurgoldið meirvirðisgjald eftir hesi grein, skal motorakfarið verða skrásett í seinasta lagi 31. desember 2024."

3. § 3 d, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Tey, sum gera íløgur í góðkendar hitapumpuskipanir til upphiting og heitt vatn í sethúsum og bygningum, kunnu eftir umsókn fáa endurgoldið part av meirvirðisgjaldinum av íløgukostnaðinum til hitapumpu, útbúnað og arbeiðsløn. Í 2021 og 2022

verður alt meirvirðisgjaldið endurgoldið. Í 2023 og 2024 verður helvtin av meirvirðisgjaldinum endurgoldið. Í 2025 og fylgjandi ár verður meirvirðisgjaldið ikki endurgoldið."

4. Í § 3 d, stk. 3, nr. 3 verður "31. desember 2020" broytt til: "31. desember 2024".

5. Í § 3 d, stk. 3, nr. 4 verður "31. mars 2021" broytt til: "31. mars 2025".

6. Í § 10, stk. 2, 1. pkt. verður "12.500 km" broytt til: "10.000 km".

7. § 10, stk. 2, 2. pkt. verður strikað.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2021.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Uppskotið hevur tvey høvuðsendamál

- at leingja og lutvíst útbyggja heimildirnar at endurrinda meirvirðisgjald í sambandi við bygging/umbygging av ávísum leigubústøðum, og keyp av ávikavist orkuvinarligum motorakførum (el-, vetnis- og plug-in hybrid akførum) og elriknum hitapumpuskipanum
- at dagføra reglurnar um leigubilar

Verandi ásetingar um endurrindan av meirvirðisgjaldi í sambandi við bygging/umbygging av ávísum leigubústøðum, og keyp av ávikavist orkuvinarligum motorakførum (el-, vetnis- og plug-in hybrid akførum) og elriknum hitapumpuskipanum eru allar tíðaravmarkaðar til 31. desember 2020.

Við uppskotinum verða afturberingarskipanirnar longdar.

Skipanirnar hava allar nøkur ár á baki, men enn verður mett neyðugt at stuðla fólki fíggjarliga, soleiðis at valið lættari fellur á orkuvinarligar loysnir, og verður skipanin tí longd í nøkur ár aftrat.

Seinna høvuðsendamálið við uppskotinum er at dagføra verandi reglur um leigubilar.

Leigumarknaðurin fyri bilar er í Føroyum í høvuðsheitum avmarkaður til summarhálvuna.

Fyri at gera tað lættari hjá bilútleigarum at selja leigubilar, eftir at árstíðin fyri at leiga út bilar er liðug, verður kravda kilometurtalið fyri leigubilar í § 10, stk. 2 í mvg-lógini lækkað úr 12.500 km niður í 10.000 km.

Tað er samstundis ein sannroynd, at verandi lóggáva ger tað sera trupult fyri ikki at siga ógjørligt at gera íløgur í dýrar leigubilar og harvið nøkta eftirspurningin hjá billeigarum, sum ynskja sær ein bil, sum í dygd og hentleikum er omanfyri miðal.

Av somu orsøk eru tað ikki leigubilar tøkir til kræsna billeigaran.

1.2. Galdandi lóggáva
Endurgjald sambært § 3 b (leigubústaðir)
Tey, sum byggja ella umbyggja ein bygning til leigubústaðir fyri meira enn 200.000 kr., mvg ikki íroknað, kunnu fáa endurgoldið inngangandi meirvirðisgjaldið av byggikostnaðinum.

Treytirnar fyri at fáa endurgoldið meirvirðisgjaldið eru:

- at talan er um í minsta lagi tveir leigubústaðir, harav í minsta lagi 10%, tó minst ein bústaður, skal verða atkomuligur og kunna nýtast av fólki í koyristóli,
- at matrikulnummarið, har leigubústaðirnir verða bygdir ella umbygdir, ikki hevur við sær lán, har rentustuðul verður veittur.

Arbeiðið, sum meirvirðisgjald kann verða endurgoldið fyri, skal vera endað í seinasta lagi fimm ár eftir, at umsóknin er góðkend.

Endurgjald sambært § 3 c (el- og brintakfør)

Tann, sum keypir motorakfar, sum bert nýtir el ella brint til framdrátt, kann eftir umsókn fáa mvg´ið endurgoldið, tó í mesta kr. 70.000, sum samsvarar við ein keypsprís á kr. 350.000, íroknað mvg.

Fyri at fáa mvg´ið endurgoldið skal motorakfarið vera skrásett í seinasta lagi 31. desember 2020.

Endurgjald sambært § 3 d (hitapumpuskipanir)
Tann, sum ger íløgur í góðkendar hitapumpuskipanir til upphiting og heitt vatn í sethúsum ella bygningum, kann eftir umsókn fáa endurrindað mvg´ið av íløgukostnaðinum til hitapumpu, útbúnað og arbeiðsløn.

Tað er ein fyritreyt, at hitapumpan samsvarar við krøvini í bygningskunngerðini og er góðkend av Umhvørvisstovuni.

Leigubilar § 10 í meirvirðisgjaldslógini
Galdandi lóggáva ásetir, at ein leigubilur skal hava koyrt 12.500 km fyri at verða avgjaldsviðgjørdur eftir brúktbilsregluni.

Brúktbilsreglan ber í sær, at tá brúktir leigubilar verða seldir, kann sølumaðurin, tá avgjaldið ikki er fakturerað sbrt. mvg-lógini við útflýggjan til sølumannin, avgjaldsavgreiða bilin, grundað á eitt avgjaldskyldugt virði, sum er 80% av muninum millum keypsprísin og søluprísin uttan mvg. Fer søluprísurin ikki upp um keypsprísin, verður einki avgjald roknað.

Leigumarknaðurin fyri bilar er í Føroyum í høvuðsheitum avmarkaður til summarhálvuna.

Fyri at gera tað lættari hjá bilútleigarum at selja leigubilar, eftir at árstíðin fyri at leiga út bilar er liðug, verður kravda kilometurtalið fyri leigubilar í § 10, stk. 2 í mvg-lógini lækkað úr 12.500 km niður í 10.000 km.

Tað er samstundis ein sannroynd, at verandi lóggáva ger tað sera trupult fyri ikki at siga ógjørligt at gera íløgur í dýrar leigubilar og harvið nøkta eftirspurningin hjá billeigarum, sum ynskja sær ein bil, sum í dygd og hentleikum er omanfyri miðal.

Av somu orsøk eru tað ikki leigubilar tøkir til kræsna billeigaran.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Eitt av endamálunum við uppskotinum er at eggja persónum og fyritøkum at byggja/umbyggja bygningar til leigubústaðir umframt framhaldandi at stuðla íløgur í orkuvinarligar loysnir.

Eitt annað endamál við uppskotinum er at dagføra verandi reglur um leigubilar.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Við uppskotinum verða skipanirnar um afturbering av meirvirðisgjaldi í sambandi við bygging/umbygging av bygningum til leiguíbúðir ávikavist íløgur í orkuvinarligar loysnir longdar.

Samstundis verða verandi reglur um leigubilar dagførdar.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Stundir hava ikki verið til at senda uppskotið til hoyringar.

Talan er í høvuðsheitum um at leingja freistir, og viðkomandi partar eru áður hoyrdir í málinum.

Hóast uppskotið ikki formliga hevur verið til hoyringar, hevur Fíggjarmálaráðið samskift við TAKS um uppskotið.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Inntøkurnar frá meirvirðisgjaldi fella til landskassan, og tí er tað landið, sum ber kostnaðin, tá meirvirðisgjald verður afturrindað.

TAKS hevur upp á fyrispurning upplýst, at tað kostaði landskassanum 35 mió. kr. í 2018 at afturbera mvg í sambandi við bygging/umbygging, el- og brintbilar og hitapumpur.

§ 3 b (bygging og umbygging av leigubústøðum) 29 mió. kr.
§ 3 c (el- og brintbilar) 3,6 mió. kr.
§ 3 d (hitapumpur) 2,4 mió. kr.

Fíggjmálaráðið hevur ikki tøl, sum geva klárar ábendingar um, hvørjar fíggjarligar avleiðingar broytingarnar viðvíkjandi leigubilum fara at hava, men mett verður, at broytingin hevur við sær eitt størri og betri útboð av leigubilum, eins og tað gerst lættari at sleppa av við leigubilar, serliga dygdargóðar leigubilar.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
TAKS hevur áður upplýst, at afturberingarskipanirnar ikki hava nógva umsiting við sær.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri vinnuna, og hevur hetta samband við, at tíðarskeiðið, har orkuvinarlig akfør og orkuvinarligar hitaskipanir kunnu útvegast til ein lægri avgjaldskostnað, verður longt. Lægri avgjald ber í sær ein størri eftirspurning.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri umhvørvið, eftirsum orkuvinarlig akfør og orkuvinarligar hitaskipanir eru meira umhvørvisvinarlig.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið hevur jaligar sosialar avleiðingar, eftirsum uppskotið viðvirkar til, at útboðið av leigubústøðum, herundir bústøðum, sum eru atkomuligir og kunnu nýtast av fólki í koyristóli, økist.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Føroyar hava bundið seg til at fylgja Paris avtaluni um at minka útlátið av veðurlagsgassi. Við at stuðla grønum loysnum bæði til upphiting av bústøðum og til framdrátt av akførum minkar útlátið av CO_2.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri Hoyvíkssáttmálan.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**
   Uppskotið hevur ongar avleiðingar við atliti at EMRS.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**

Uppskotið hevur jaligar sosialar avleiðingar, eftirsum uppskotið viðvirkar til, at útboðið av leigubústøðum, herundir bústøðum, sum eru atkomuligir og kunnu nýtast av fólki í koyristóli, økist.

2.9. Markaforðingar

Uppskotið hevur ikki við sær markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv

Uppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir og ger heldur ikki onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld

Uppskotið ber í sær endurrindan av meirvirðisgjaldi í sambandi við bygging/umbygging av ávísum leigubústøðum, og í sambandi við keyp av ávikavist orkuvinarligum motorakførum og elriknum hitapumpuskipanum.

2.12. Gjøld

Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?

Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?

Uppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Ja	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Ja	Nei	Nei	Ja	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1

§ 1, nr. 1
Við uppskotinum verður verandi skipan um afturbering av meirvirðisgjaldi til tann, sum byggir/umbyggir bygning til leigubústaðir fyri meira enn kr. 200.000, meirvirðisgjald ikki íroknað, longd í fimm ár.

§ 1, nr. 2
Við uppskotinum verður meirvirðisgjaldsafturberingin í sambandi við keyp av orkuvinarligum motorakførum longd og víðkað til eisini at fevna um plug-in hybrid akfør, men samstundis verður afturberingin yvir tíð avmarkað í prosentum fyri síðani at fella burtur, og er hetta grundað á, at roknað verður við, at prísurin á hesum motorakførum við tíðini fer at lækka.

Ein plug-in hybrid er ein bilur, sum hevur tveir motorar til framdrátt. Ein, sum nýtir svarta orku, og ein, sum nýtir grøna orku.

Ein plug-in hybrid bilur kann eins og ein el- ella vetnisbilur koyra 100% uppá grøna orku.

§ 1, nr. 3
Við uppskotinum verður skipanin við meirvirðisgjaldsstuðli longd, men samstundis minkar stuðulin í stigum yvir fýra ár fyri síðani at fella burtur.

§ 1, nr. 4
Ásetingin staðfestir, at útreiðslurnar skulu vera bornar í seinasta lagi 31. desember 2024.

§ 1, nr. 5
Ásetingin staðfestir, at fyri at fáa endurrindað meirvirðisgjaldið, skal góðkend umsókn vera TAKS í hendi í seinasta lagi 31. mars 2025.

§ 1, nr. 6
Við uppskotinum verður talið á kilometrum, sum leigubilurin skal hava koyrt, broytt til 10.000 km sum fyritreyt fyri, at akfarið kann verða avgjaldsviðgjørt eftir brúktbilsregluni.

Brúktbilsreglan ber í sær, at tá brúktir leigubilar verða seldir, kann sølumaðurin, tá avgjaldið ikki er fakturerað sbrt. mvg-lógini við útflýggjan til sølumannin, avgjaldsavgreiða bilin, grundað á eitt avgjaldskyldugt virði, sum er 80% av muninum millum keypsprísin og søluprísin uttan mvg. Fer søluprísurin ikki upp um keypsprísin, verður einki avgjald roknað.

§ 1, nr. 7
Verandi áseting, sum hevur ein mesta frádrátt á kr. 45.000, ber í sær, at tað ikki loysir seg fíggjarliga fyri ein bilútleigara at keypa ein dýran leigubil til billeigaran, sum ynskir sær ein bil, sum í dygd og hentleikum liggur omanfyri miðal.

Samstundis ber ásetingin í sær, at tað ikki eru leigubilar tøkir til kræsnu billeigararnar.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Fíggjarmálaráðið, 08. desember 2020

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur